

# Posta Stamps Føroyar

Nr. 35

Februar 2018

ISSN 1603-0036

- Havnar Sjónleikarfelag 100 ár
- Sepac 2018: Brim yviri við Strond
- Norðurlandaútgáva 2018: Makrelur
- Europa 2018: Brýr
- Fuglafjarðar kommuna 100 ár

Posta
FAROE ISLANDS




FO 881-882 Royndarprent




# Havnar Sjónleikarfelag 100 ár

**Sjónleikur í Havn**

Í Havn hava fólk spælt sjónleik leingi. Úr ferðafrásagnunum hjá J. C. Svabo 1781 – 1782 vita vit, at ungir føroyskir studentar frá Keypmannahavn hava framført Holberg komediurnar *"Den Ellevte Junii"* og *"Den Politiske Kandestøber"* í Havn við góðum úrsliti. At tað var júst Holberg, ið varð spældur, er ikki so løgið – sjónleikir á føroyskum vóru ikki til, og higartil var Holberg tann einasti, ið hevði skrivað upprunaligan danskan sjónleik.

Hóast ongin ivi er um, at sjónleikur hevur verið framførdur í árunum eftir hetta, finnast ongar skrivligar keldur til tess. Ikki fyrr enn ein starvsmaður hjá kongaliga Einahandlinum, Christopher Olsen, í 1846 skrivar í dagbók sína, at tey hava søkt um loyvi at selja atgongumerki til ein sjónleik. Hann sigur víðari: *"før ere Tilskuerne blot blevne inviterede og have intet betalt,"* og tað bendir á at sjónleikur hevur verið spældur frammanundan í býnum. Sjónleikurin, ið Olsen sipar til, var annars ein heilt nýggjur leikur, *"Pak"* eftir Th. Overskou, sum stutt frammanundan hevði gingið fyri fullsettum húsum í *"Det Kongelige Teater"* í Keypmannahavn. Árini eftir vórðu fleiri sjónleikir framførdir í Havn, serliga av Holberg, men eisini av øðrum rithøvundum, m.a. týska Kotzebue.

**Fyrsta sjónleikarfelagið**

Í 1855 stovnaði fyrrnevndi Christopher Olsen saman við øðrum áhugaðum, fyrsta sjónleikarfelagið í Havn, *"Thorshavns Skuespillerselskab."* Nú varð sjónleikur spældur so at siga á hvørjum ári. Sambært sjónleikarsøguligari grein hjá C. Holm Isaksen (Kristin í Geil) í Varðanum 1925, vóru tað, umframt Holberg, verk av tátíðar donskum dramatikarum, sum Johan Ludvig Heiberg, Johanne Louise Heiberg, Thomas Overskou, Erik Bøgh og Jens Christian Hostrup.

Tað vóru serliga fólk *"av frægara slagnum,"* danskir og føroyskir embætismenn og frúur, saman við vaksandi stættini av handverkarum og fólki innan handilsvinnuna, sum spældu sjónleik í Havn. Eg kann til stuttleika nevna, at sýslumaðurin og politikarin, H. C. Müller, sum varð útgivin á frímerki fyrr í ár, eisini var ein íðin áhugaleikari.



Mynd frá 1889 av manningini til sjónleikin "Veðurføst."
Niðast til vinstru situr Súsanna Helena Patursson, sum bæði skrivaði leikin og spældi við.

**Fyrstu føroysku sjónleikirnir**

Í 1870'árunum vaks ein spírandi føroysk tjóðskaparrørsla fram millum føroyskar studentar í Keypmannahavn. Rørslan hevði serliga mentanarligan og málsligan áhuga – og tá studentarnir eftir loknan lestur komu heim aftur til Føroya, festi rørslan rót her heima eisini. Við vaksandi tjóðskaparkensluni kom sjálvsagt eisini áhugin at varðveita føroyska mentan, serliga málið. Tjóðskaparrørslan vaknaði av álvara á víðagitna jólafundinum í 1888, har *Føringafelag* varð stovnað, sum skuldi virka til frama fyri mál og mentan á føroyskum.

Hetta førdi við sær vaksandi viðurkenning av tørvinum á føroyskum bókmentum, frálærutilfari, tíðindaflutningi, kirkjumáli, sálmum og sangum – og sjálvandi eisini sjónleiki, skrivaður á føroyskum, runnin úr føroyskum viðurskiftum og føroyskari mentan.

Úrslitið kom longu árið eftir. Í 1889 vórðu tveir sjónleikir frumframførdir sama kvøld í Tinghúsinum. Fyrri var leikurin *"Veðurføst,"* skrivaður av fremstu undangongukvinnuni innan kvinnurættindi í Føroyum, Súsonnu Helenu Patursson (1864 – 1916). Sjónleikurin er tíanverri ikki til í heilum skapi longur, men snúði seg stórt sæð um leiklutin hjá kvinnunum í tjóðskaparrørsluni.
Hin leikurin var *"Gunnar Havreki,"* ein romantiskur hetjuleikur, skrivaður av fremsta undangongumanninum í tjóðskaparrørsluni, Rasmus Effersøe (1857 – 1917).

Hetta var byrjanin til nýggja siðvenju á føroyska sjónleikarpallinum. Danskir sjónleikir vóru framvegis mest spældir, men so líðandi komu nýggir føroyskir leikir til. Í 1890 komu tveir nýggir sjónleikir: *"Jákup á Møn,"* eftir Sigrid Niclasen og *"Hjá Dalabóndum,"* eftir Rasmus Effersøe. Sama ár varð eisini fyrsti Holberg leikurin framførdur á føroyskum, umsettur av Effersøe.

**Annað sjónleikarfelagið**

Hóast sjónleikarumhvørvið treivst væl í Havn í 1890'árunum, var tørvurin stórur á einum



Sjónleikarhúsið í Havn.

sjónleikarhøli burturav. Higartil var spælt í ymsum hølum, serliga Tinghúsinum. Men tað var tvørligt og arbeiðskrevjandi at stilla upp og taka niður millum leikirnar.
Loysnin kom við at Havnar Klubbi vildi byggja eina lon upp í felagshúsini, sum kundi brúkast til sjónleik burturav. Havnarfólk stovnaðu tí *"Den dramatiske forening i Thorshavn,"* sum bant seg at gjalda rentur og avdrátt í fimm ár. Afturfyri fekk felagið fullan brúksrætt til nýggju hølini.

Tá nýggju hølini vórðu tikin í brúk í 1893, frumframførdu havnarfólk romantiska dramaleikin *"Magnus"* eftir R. Effersøe. Harafturat var ein danskur leikur spældur, *"Fastelavnsgildet"* eftir Erik Bøgh.

Nú hevði sjónleikurin betri kor at arbeiða undir, men tørvurin á føroyskum sjónleiki var framvegis stórur. Á føstulávint 1895, var enn ein Effersøe sjónleikur frumframførdur. Hetta var leikurin, *"Best man vera sum er,"* ein føroysk fólkalívsmynd frá seinnu helvt av 18. øld.
Næstu tjúgu árini vóru hampuliga góð fyri sjónleikarumhvørvið í Havn. Alsamt betri danskir sjónleikir vóru framførdir, sum óivað hava verið til menning fyri sjónleikarar og áskoðarar. Í 1908, 100 ára dagin fyri deyða Nólsoyar Páls, var føroyski sjónleikurin, *"Ófriðarligar tíðir,"* eftir C. Holm Isaksen (1877-1935) frumframførdur.

**Havnar Sjónleikarfelag – triðja sjónleikarfelagið**

Í januar 1918 kallaðu nakrir av fremstu mentamonnum í Havn inn til stovning av nýggjum sjónleikarfelag. Endamálið hjá felagnum var til frama fyri føroyskan sjónleik – og at betra um fysisku korini hjá sjónleikarumhvørvinum. Sjónleikarlonin í Havnar Klubba hevði víst seg at vera eitt sindur ópraktisk og tørvurin á einum sjónleikarhúsi burturav var stórur.

19. februar 1918 skipaði felagið fyri fyrsta tiltakinum, vígt yrkjaranum Bjørnstjerne Bjørnson, við fyrilestri, upplestri og sangi. Hesin dagur verður í dag mettur sum stovningardagur hjá Havnar Sjónleikarfelag.
Tiltøkini hildu fram einaferð um mánaðin við skiftandi tema - og í juli framførdi sjónleikarfelagið *"Den Politiske Kandestøber"*

eftir Ludvig Holberg, týddur til føroyskt av Richard Long (1889-1977).

Í 1820 avgjørdi Havnar Klubbi at nýta sjónleikarlonina til biograf – og enn einaferð misti sjónleikarumhvørvið tak yvir høvdið. Fólk fóru tí undir at savna inn pening til eitt nýtt hús, og longu í 1926 stóð Sjónleikarhúsið liðugt, teknað av einum av stovnarunum av Havnar Sjónleikarfelag, H. C. W. Tórgarð (1885-1957).

Við Sjónleikarhúsinum fekk Havnar Sjónleikarfelag endiliga fastar rammur um sítt virksemi. Húsið var ein mentanardepil, har fremstu yrkjarar og rithøvundar okkara, sum H. A. Djurhuus og William Heinesen, dagliga hugdu inn á gólvið. H. A. Djurhuus, sum búði í grannahúsunum, var annars formaður felagsins frá 1930 til 1951. Upp gjøgnum tríatiárini var virksemið stórt í sjónleikarumhvørvinum og alt fleiri sjónleikir vórðu settir upp á føroyskum.

Undi øðrum heimsbardaga, lá sjónleikurin á láni, tí bretska hersetingarvaldið brúkti sjónleikarhúsið til manningarhøli. Hetta er eisini orsøkin til, at vit ikki vita nakað serligt um virksemið hjá felagnum millumkrígsárini. Gerðabøkur og handrit lógu undir lási í einari skriviborðskuffu í húsinum – og tá felagið fekk húsini aftur eftir kríggið, var skriviborðið burtur. Mistu skjølini komu ongantíð afturíaftur, so okkara vitan stavar bert frá munnligari frásøgn og greinum í bløðunum.

Eftir kríggið kom aftur gongd á sjónleikarlívið í Havn – og Sjónleikarhúsið var aftur náttúrligi miðdepilin fyri virksemið. Føstu karmarnir gjørdu, at fólk fóru undir meira krevjandi verkætlanir enn fyrr. Upp gjøgnum fimtiárini var sjónleikarkynstrið ment – og stórleikatíðin hjá felagnum og húsinum byrjaði fyrst í sekstiárunum, tá útbúni sjónleikarin og leikstjórin, Eyðun Johannesen, varð settur í starv sum dagligur leiðari. Dramafrálæra varð skipað fyri áhugaleikarar – og føroyskir rithøvundar skrivaðu og umsettu leikir til framførslurnar. Pallsmíð var eisini í menning hesa tíðina og varð framt av listafólki. Tað var eisini í kjalarvørrinum á hesum gullaldrinum, at vit fingu okkara fyrstu yrkissjónleikarar.

Fíggingin til virksemið kom fyri ein stóran part frá sjálvum húsinum. Dansur var javnan í Sjónleikarhúsinum, serliga var tað ikoniski tónleikarbólkurin Goggan, ið spældi upp til dans tann tíð tað var. Harafturat skipaði Sjónleikarhúsið fyri filmssýningum vanligar gerandisdagar, konsertum og útleiging, tá hølini ikki vóru upptikin av sjónleikarvirksemi. Í dag fær felagið eisini eitt sindur av almennum stuðli, men verður enn fyri tað mesta rikið av eldhugaðum sjálvbodnum fólki.

Havnar Sjónleikarfelag og Sjónleikarhúsið vóru og eru framvegis karmurin um áhugasjónleik í Havn. Støðið er høgt og virksemið fjølbroytt – millum annað skipa tey fyri dramafrálæru fyri børn og ung í samstarvi við Tórshavnar Kvøldskúla. Harafturat kemur so sjálvandi eitt breitt útboð av framførslum. Tað sum í sínari tíð byrjaði sum húsvilt frítíðarítriv hjá sjónleikaráhugaðum havnarfólki, er í dag ein nógv virdur, sjálvstøðugur stovnur, hvørs avrik eiga pláss fremst í mentanarsøguni í Havn.
Hjartaliga tillukku við teimum 100 árunum. Vónandi verður komandi øldin líka so mennandi sum tann farna.

*Anker Eli Petersen*




**Um frímerkjaarkið**
Bakgrundsmyndin á frímerkjaarkinum er ein fotomynd frá 1889 av manningini til sjónleikin "*Veðurføst*." Í reyðgula rútinum til vinstru hómast andlitið á Súsonnu Helenu Patursson, sum bæði skrivaði leikin og spældi við.

Tá fyrstu føroysku sjónleikirnir, "*Veðurføst*" og "*Gunnar havreki*" vóru frumframførdir í tinghúsinum í Havn í 1889, hekk eitt merki yvir pallinum við áskriftini; *"Til gaman og álvara."* Hendan parolan gjørdist ein partur av skreytinum í nýggja Sjónleikarhúsinum frá 1926 og hongur enn yvir pallinum. Mitt í paroluni hongur ein andlitsmynd av Rasmus Effersøe, sum skrivaði fleiri av fyrstu føroysku sjónleikunum. Teksturin er teknaður eftir originalinum og settur undir frímerkini á arkinum. Myndin av Effersøe er tó útskift við búmerkið hjá Havnar Sjónleikarfelag.

Sjónleikarumhvørvi hava eftir gomlum siði ofta litrík leiktjøld, tí valdi eg at brúka teir vælkendu rútarnar á búnanum hjá Harlekin-leikaranum í Comedia dell'arte sum bakgrund. Eyðkenni fyri satiru og parodi.

Ein onnur vælkend sjónleikarímynd eru tær báðar grímurnar, sum umboða ávikavist komediu og drama. Grímurnar stava frá átrúnaðarligum ritualum í griksku Dionysos dyrkanini og sum ímyndir fyri Thaliu, músa fyri skemtileik – og Melpomene, músa fyri sorgarleik og song.

Myndevnið á ovara frímerkinum er úr sjónleikunum *"Kálvur lítli"* eftir Ólavur Michelsen, leikárið 63/64 og *"Og tó skínur sólin"* eftir Valdemar Poulsen, leikárið 65/66.

Myndevnini á niðara frímerkinum eru bæði frá sjónleikinum *"Sangur í mjørka"* eftir Elin av Rógvi, leikárið 2013/14.

*Anker Eli Petersen*

# Útgávuætlan 2018

**26. februar** **Flugur** - smáark við fýra frímerkjum: skinfluga, lærlitt loðmýggj, køstafluga og húsfluga. Teknað: Astrid Andreasen. Virði: 4 x 12,00 kr. FO 872-875.

**H.C Müller 100 ár** - eitt frímerki. 200 ár síðan fyrsti postmeistarin í Føroyum varð føddur. Lagt til rættis: Anker Eli Petersen. Virði: 18,00 kr. FO 876.

**Sandsvatn og Toftavatn** - tvey frímerki og sjálvklistrandi hefti. Trið- og fjórstørstu vøtn í Føroyum. Myndir: Jógvan Horn & Durita Jacobsen. Virði: 10,00 og 20,00 kr. FO 877-878.

**Lundafleyg** - tvey frímerki. frímerkini vísa tveir ymsar veiðihættir við fleygingarstong. Tekningar og gravura: Martin Mörck. Virði: 10,00 og 44,00 kr. FO 879-880.

**23. apríl** **Havnar Sjónleikarfelag 100 ár** – smáark við tveimum frímerkjum. Anker Eli Petersen hevur lagt til rættis. Virði: 2 x 19,00 kr. FO 881-882.

**SEPAC 2018: Brim yviri við Strond** - eitt frímerki og postkort. Mynd: Ólavur Frederiksen. Virði: 20,00 kr. FO 883.

**Norðurlandaútgáva 2018: Makrelur -** eitt frímerki. Astrid Andreasen hevur teknað. Virði: 18,00 kr. FO 884.

**EUROPA 2018: Brýr** - tvey frímerki og sjálvklistrandi frímerkjahefti (6). Brúgvin við Streymin og nýggja brúgvin um Sandá. Myndir: Ólavur Frederiksen. Virði: 10,00 og 18,00 kr. FO 885-886.

**Fuglafjarðar Kommuna 100 ár** - tvey frímerki. Snið: Suffía Nón. Virði: 14,00 og 22,00 kr. FO 887-888.

**21. september** **Postgjaldsmerki til framsýning í Macau** - fýra ymisk. Myndevni: hundar. Virði: 4 x 10,00 kr.

**24. september** **Friðurin 1918. Fyrri heimsbardagi endar** - smáark við fýra frímerkjum. Anker Eli Petersen leggur til rættis. Virði: 4 x 10,00 kr.

**Regin Dahl 100 ár** - eitt frímerki. Regin Dahl (1918-2007) var ein av okkara mætastu yrkjarum. Lagt til rættis: Kim Simonsen. Virði: 28,00 kr.

**Føroysk klæðir III** - tvey frímerki, sjálvklistrandi hefti (6) og postkort. Triðja og seinasta útgáva, sum lýsir tjóðbúnan. Edward Fuglø teknaði. Virði: 18,00 og 20,00 kr.

**Jólafrímerki** - tvey frímerki. Halgimyndir. Halgimynd, sum Astrid Andreasen hevur málað og gomul russisk halgimynd, sum Gamli Bókahandil eigur. Virði: 10,00 og 18,00 kr.

**1. oktober** **Postgjaldsmerki 2018** - fýra ymisk við vitum í Føroyum. Snið: Miriam Hinz. Virði: 4 x 10,00 kr.

**5. november** **Árbók, ársmappa, og jólamerki**




FO 883 Royndarprent




# SEPAC 2018: Brim yviri við Strond

**Stórfingin veðurfyribrigdi**

Tey hvukku helst við, ferðafólkini á kampingplássinum yviri við Strond, tá brimið brádliga stóð himmalhøgt beint við har tey stóðu. Tað er ikki óvanligt at vindur og sjóvarfall skapa uppgang yviri við Strond – í hesum føri var tó ikki vandi á ferð. Men ógvusligt og stórsligið tekur tað seg út.

Á hvørjum ári koma ferðafólk í túsundatali til oyggjarnar at síggja, uppliva ella sansa milda føroyska summarið. Mentanina, ógvusligu náttúruna og so friðin í føroysku summarnáttini, sum ongantíð verður heilt myrk og har tøgnin fyllist av margfaldum náttúruljóma.

Og tað er eisini frálíka gott. Vit føroyingar elska eisini summarið við øllum sínum viðbrøgdum, veitsluróma, virkni og ró.

**Ódn og marghháttligar máliskur**

Men, sum hvørt mansbarn í Føroyum veit, so er tað uttanfyri ferðafólkatíðina ein skal koma, um ein vil uppliva veruligt náttúrudrama. Um heystið ella um veturin, tá náttúran bjóðar ógvusligt veður og ørandi leik. Tíðin, tá lágtrýstini koma rullandi inn yvir oyggjarnar, eitt fyri og annað eftir, og stormur og ódn koma brestandi oman av fjøllunum, herja fram gjøgnum sund og fjørð og skræða í hús og tekjur.

Tíðin, tá føroyingar finna serstakar máliskur fram, sum *"glaðustrok,"* tá karráa ódnin pískar sjógvin upp í meldurhvirlum. Sum *"áarføri,"* tá glopraregn øsir tær annars so fryntligu áirnar upp til ógvusligan floym, ið skræðir áarbakkan við sær og stundum brýtur nýggja slóð. Ella skemtiligu máliskuna: *"áirnar fletta upp um seg,"* um løgna fyribrigdið, tá vindurin lyftir fossarnar í homrunum og fær áirnar at renna uppeftir.

**Skaðaódn**

Men mest av øllum óttast vit máliskuna *"skaðaódn,"* um ódnir so ógvusligar, at tær bróta fyri sær, smildra bygningar, boyggja stálkonstruktiónir og ríva bøkkarnar við sær.



Áirnar fletta upp um seg.
Mynd: Ólavur Frederiksen.

Seinastu tríati árini, hava óvanliga nógvar ódnir herjað í Føroyum, serliga í novembur og desembur. Tað byrjaði við ógvusligu jólaódnini í 1988, sum elvdi til umfatandi skaða, serliga í Havn. Fleiri hús fórust í hvirlunum, húsatekjur flugu langar leiðir og stórir partar av viðarlundunum kring landið vórðu javnaðar við jørðina. Skip og bátar slitu, bátar sukku í bátahyljunum og bilar vórðu so tuskaðir til, at teir ikki gjørdust aftur.

Minnist, at eg morgunin eftir, fann ovasta part av einum skorsteini í túninum. Hvørki húsið eg búði í ella grannahúsini manglaðu skorsteinin, so allarhelst er hann dottin av onkrari flúgvandi tekju ta náttina. Tað er framvegis óvist, hvussu sterk ódnin var – haldi meg ørminnast okkurt um at vindmátarar brotnaðu við 62 m/sek, men skal ikki siga tað við vissu. Allarhelst hava hvirlurnar verið ógvusligari enn sum so – tað var í hvussu er ikki nøkur vøkur sjón ið møtti einum dagin eftir.

Kringvarp Føroya sendi í 2013 ein dokumentar um jólaódnina í 88. Sendingin finst í arkivinum hjá kringvarpinum: http://kvf.fo/dokumentarurin?page=13&sid=20647

Og soleiðis hevur skilið verið ár undan ári. Ódnir við skiftandi mátti raka javnan Føroyar. Ógvusligar eftir vanligum metum, men tær flestu ikki líka ringar sum tann í 88.

Men 24. novembur 2011 rakti ein kolandi ódn aftur Føroyar og elvdi til stóran materiellan skaða kring landið. Tvey ár seinni, tann 14. desembur 2013, var aftur galið. Báðar hesar ódnirnar kundu metast við jólaódnina í 88.

Harðasti vindur ið máldur er í Føroyum, stavar frá enn einari jólaódn. Tann 26. desembur 2016, klokkan 06.08 um morgunin, staðfestu vindmátarar á Norðradalsskarði eina hvirlu upp á 78,7 m/sek. Harðasti miðalvindur, máldur yvir eitt longri tíðarskeið, var 52 m/sek. Hetta var ódnin Urð, sum eisini gjørdi um seg í Noregi, Stórabretlandi og



Illveður á Viðareiði í 2012.
Mynd: Jóannis Sørensen.

Danmark. Til samanlíkningar kann nevnast, at harðasta hvirlan av Urð í Danmark, var máld til 37,8 m/sek. - meðan harðasti miðalvindur kom upp á 29 m/sek.

**Brim**

Stormur og ódn hava til allar tíðir havt ein trúgvan fylgisvein. Tað er brimið, sum í Føroyum kann vera ein sera hugtakandi sjón, tá tað brestur móti strond ella brýtur yvir hólmar og sker - serliga hjá ferðafólki ið ikki eru von við slíkt. Undir serligum ekstremum umstøðum kann uppgangurin verða so ógvusligur, at skúmið drívur yvir bygdir ið liggja høgt í landslagnum – og enntá blaka grót og brotgóðs av botni, langt upp á land. Men sjálvt í sløkum vindi, kann brim og uppgangur ala fram serstakt huglag ið bara kann upplivast á staðnum.

**Kavi**

Orsakað av heita golfstreyminum, hava Føroyar eitt relativt milt veðurlag, hvat temperaturi viðvíkur. Men man skal ikki meir 200 metrar upp frá havfløtuni, fyrr enn ein stendur í pólveðurlagi. Hetta merkir, at fjøllini ofta eru hvít longu seint á heysti, hóast ongin kavi er niðri við strendurnar. Man kann tó uppliva stórkava niðri í bygdum øki, serliga í desembur, januar og februar – men kavin liggur sjáldan leingi.

Føroyar í kava er eitt upplivilsi fyri seg, serliga uppi millum fjalla, har ein kann uppliva stórfingnar landslags- og náttúrumyndir.

So, um ein hevur hug at vitja sanna leikvøll veðurgudanna, skal man bara koma til Føroyar á vetri. Vónandi kemur ein ikki út fyri skaðaódn, men minni kann eisini gera tað – ein lítil frísklig ódn, til dømis?

Vit kunnu í hvussu er garantera ringt veður.

*Anker Eli Petersen*

# Take a trip to the island of Jersey and discover...

## Nature

**Links with China: Butterflies**




**Links with China: Waterfowl**




Designed by Martin Mörck and Wang Huming

**100 years of Jersey Beekeepers Association**







Stamps infused with the scent of honey

## Beautiful Scenery

**Castles & Forts**




**Jersey Seasons - Spring**




## And learn about our history




**Victory & Liberation**




**Lillie Langtry**




**Ancient Artefacts**

**Visit the website to see our full range and to order online.**

# www.jerseystamps.com

**Or email stamps@jerseypost.com quoting FAROES to receive a £5 discount voucher* and Jersey Stamps Bulletin**

*Valid for one year, may be used with orders sent by post, one per household.

**Jersey Post**

Email: stamps@jerseypost.com Tel: +44 (0)1534 516320 www.facebook.com/jerseystamps @JerseyStamps




FO 884 Royndarprent




# Norðurlandaútgáva 2018: Makrelur

Føroyar eru kendar kring allan heim fyri sínar framúr fiskaúrdráttir. Tað kemst av, at vit hava ein fiskiflota, sum er í serflokki. Skipini eru sera framkomin, og bygd til endamálið, so at tey kunnu hagreiða fiskin skjótt og væl. Tá skipini koma til lands við fiskinum, hava vit virkir, ið eisini eru í einum flokki fyri seg, og fólkið, ið er umborð, og fólkið, ið arbeiðir á landi, eru serkøn á økinum, so at alt er ein eind.

Havið kring Føroyar er eitt tað reinasta á móðir jørð, og ger hetta, saman við dygdargóðum skipum, virkjum og ikki minst dugnaligum fólki, at vit fáa úrdráttir í heimsflokki.

Makrelurin, sum er eitt av stóru fiskatilfeinginum í Føroyum, er einki undantak, og hevur hann sera stóran týdning fyri land og fólk, ið her búleikast.

Makrelurin hevur nú fingið pláss á einum sera vøkrum frímerki, ið okkara dugnaliga listakvinna Astrid Andreasen hevur evnað.

Astrid hevur teknað, málað, klipt og seymað sera nógv, og hevur hon lagt eitt hav av verkum frá sær gjøgnum árini. Vónleyst er at nevna alt sum Astrid hevur latið úr hondum, so her verða nevnd trý verk, hon hevur gjørt. Tað eru tekningarnar í bókini *"Fiskar í Føroyum"*, patchwork-verkið, ið hongur í móttøkuni á Havstovuni. Og til seinast er tað altartalvan í kirkjuni í barndómsbygd hennara, Vestmanna, ið Astrid og børn hennara hava evnað til, og sum er ein tann vakrasta altartalvan í Føroyum, og hóskar hon sera væl inn í kirkjurúmið.

**Eitt sindur um makrel**

Á latín: *Scomber scombrus*, á føroyskum: *makrelur*, á donskum: *makrel*, á enskum: *mackerel*.

Makrelur er skyldur við tunfisk, og makrelur er uppsjóvar- og torvafiskur, og kann liva í stórum torvum. Ein makreltorva kann vera 100 metrar djúp og 200 metrar breið, so har kunnu vera fleiri hundraðtúsund fiskar í einari torvu.



Skip við bryggju í Klaksvík.
Mynd: Ólavur Frederiksen.

Makrelur hevur ongan sundmaga, og merkir tað, at hann kann kava skjótt, og svimja skjótt upp til vatnskorpuna uttan at fáa trupulleikar við trýstinum, altso uttan at fáa kavarasjúku.

Kroppurin er fastur og vøddamikil, og hevur hann torpedolíknandi skap. Tann fremsta ryggfjøðurin hevur tindar, og á sporlinum sita 5 – 6 smáar fjaðrar á ryggi og búki. Hesar smáu fjaðrar, skapið á sporlinum og V formaði sterturin eru við til at gera, at makrelur svimur sera skjótt. Smáfjaðrarnar og skapið á sporlinum minka eisini um vatnmótstøðuna.

Makrelur er ljósagrønur á rygginum við myrkagrønum óregluligum tvørstrípum. Búkurin glitrar silvurlittur, hvítur og ljósareyður, og tað eru ongar strípir undir síðustrípuni. Vøddarnir eru myrkir. Makrelur kann blíva 65 cm langur og viga upp til 3,5 kg. Makrelur yvir 2 kg er tó sjáldsamur.

Útbreiðslan av makreli er úr Atlantshavinum frá Gibraltar til Eysturgrønlands og norður til Svalbard. Makrelur hevur verið veiddur í Íslandi í nøkur ár, og seinastu árini hevur makrelur eisini verið at fingið í Eysturgrønlandi. Eisini fæst hann í Svartahavinum og Miðalhavinum.

Um veturin heldur hann til á djúpum vatni norðarlaga í Norðsjónum rundan um Hetland og vestanfyri Bretsku oyggjarnar, og hesa tíðina etur hann lítið og einki.

Makrelur er trý ár, tá hann er kynsbúgvin. Á vári frá mars/apríl til juli er gýtingartíð. Hann gýtur um 500.000 til 1 millión rogn, sum flóta í vatnskorpuni, har tey blandast saman við silinum. Umleið 6 dagar seinni verður ynglið, sum er um 4 mm til longdar, klakt. Makrelur veksur skjótt fyrstu tíðina, og tá hann er ársgamal er hann um 20 cm langur. Seinnu árini hevur makrelur eisini gýtt inni á føroyskum øki.



Makrelur í Nólsoyarfirði, 2010.
Mynd: Hans Eli Sivertsen.

Tíðliga um summarið etur hann mest reyðæti, seinni um summarið etur hann veingjasniglar og krill. Tá ætið er burtur í sjónum tíðliga um heystið, etur hann nebbasild, brisling o.a.

Millum føroyingar er makrelur ikki ókent fiskaslag. Makrel hava føroyingar veitt í nógv ár, tó uttan at hann hevur verið nýttur til matna hjá okkum. Mesta av veiðuni er farið til útflutning. Hann hevur verið nógv nýttur sum agn.

Seinastu árini hevur tað verið væl meira til av makreli í føroyskum sjóøki, og er fiskaríið 20 faldað í føroyskum sjóøki síðan 2010.

Makrelur er sera nógv avhildin fiskur til matna, men heldur sær ikki væl, tí fitin í vøddunum iltast skjótt og verður fiskurin skjótt tráur. Teir fitikendu vøddarnir eru sera vælsmakkandi og føðslugóðir. Makrelur er sunnur fiskur og kemst hetta av, at hann hevur í sær nógvar B12 vitaminir og Omega-3 feittsýrur (tvær ferðir so nógv sum í laksi), samstundis er kyksilvurinnihaldið lágt.

Um ein nú til stuttleika googlar: *"kóka ein makrel"* koma 3.320 ymiskar síður upp. Sláa vit upp á donskum *"kog en makrel,"* so poppa 33.000 síður upp við ymiskum uppskriftum. Sláa vit upp á enskum *"eat a mackerel"*, koma 2.280.000 síður fram. Hetta eru sjálvandi stuttlig tøl, ið ikki kunnu nýtast til nakað hagfrøðiligt.

Børn eru altíð áhugað í øllum sum rørir seg. Fiskur er einki undantak, og spyrja tey nógv inn til evnið: Eitt nú hvussu fiskur livir, um fiskur andar, hvat hann etur, hvussu nógv rogn hann gýtur o.m.a. Tá eg spyrji børnini, um teimum dámar makrelsalat, nikka øll játtandi, og siga, at tað dámar teimum væl. Men, - tey vistu ikki, at makrelsalat er ein fiskur í tomat, sum er stappaður í eina dós, og sum vaksnum børnum eisini dámar.

*Mourits Mohr Joensen*








FO 885-886

Royndarprent

# Europa 2018: Brýr

Tað kann tykjast margháttligt, tá hugsað verður um hvussu lítið landið er, men samferðsla, flutningur og logistikkur hava altíð verið ein trupulleiki í Føroyum. Fjøll og brattar líðir, har ein bert kundi ferðast til gongu – streymasund og svikaligar siglingarleiðir yvirhøvur, sum kravdu eina heila bátsmanning at flyta seg yvir. Søgn og søga siga frá mangari ótespuligari ferð millum oyggjarnar – og tað kom meir enn so fyri, at flutningur endaði í vanlukku og bráðum bana. At ferðast úr oyggj í oyggj kundi vera so tvørligt, at tað oftast var ein fyritøka fyri birgar menn í bestu árum – og tann avbyrging hetta førdi við sær gjørdi, at vit enntá fingu dialektir í einum av heimsins minstu tungumálum. Hesin trupulleikin helt sær langt upp í tíðina. Eg minnist sjálvur at hava hitt gomul fólk, serliga kvinnur, sum aldrin høvdu sett fót uttanfyri føðioynna.

Við fyrra aldarmóti kom spakuliga vend í. Skipað varð fyri spjaddum ferjuleiðum millum oyggjar og bygdir – og eftir at fyrsti bilurin kom til landið í 1922, kom eisini tørvurin fyri vegasambandi millum bygdir og býir. Seinast í sekstiárunum vóru hampuligir bilvegir millum bygdir flest, men tað var framvegis ikki gjørligt at koyra millum oyggjarnar.

Serliga var samferðslan millum Streymoy og Eysturoy tvørlig. Hóast oyggjarnar liggja tætt hvør at aðrari, var neyðugt við ferjum til bilferðsluna millum Tórshavn og økini norðanfyri á Eysturoy og í Norðoyggjum. Ein bilferja sigldi millum Havnina og Toftir á eystara armi á Skálafjørðinum, meðan ein minni ferja flutti bilar úr Hósvík til Selatraðar. Av tí at talið av bilum øktist í stórum og førdi til seinkingar og bíðitíð við ferjulegurnar, varð avgjørt at byggja eina brúgv millum tær báðar stóru oyggjarnar.

**Brúgvin við Streymin – brúgvin um Atlantshav**

Í mars 1971 fór byggifyritøkan E. Phil & Søn undir arbeiðið at byggja brúgv millum Streymoy og Eysturoy. Landsverkfrøðingurin hevði valt ein tann stytsta teinin yvir



Brúgvin við Streymin.
Mynd: Ólavur Frederiksen.

Sundalagið og árið fyri varð ein byrging løgd yvir sundið. Streymoyarmegin lá brúgvarfestið eitt sindur sunnanfyri Langasand, meðan tað eysturoyarmegin lá millum Norðskála og Oyrarbakka. Staðið kallast við Streymin, orsakað av mjækkanum í sundinum, sum gevur harðan streym í sjóvarføllunum.

Tað tók hálvtriðja ár at byggja brúnna. 220 metrar long, 9,5 metrar breið og uml. 17 metrar høg var brúgvin – og 30. oktober 1973 varð hon alment tikin í nýtslu. Fyrstu tíðina gekk ferðslan bara norðureftir, men trý ár seinni kom Norðskálatunnilin, ið bant veganetið millum brúnna øðrumegin og miðstaðarøkið við Skálafjørðin og ferjusambandið millum Leirvík og Klaksvík saman. Í 2006 kom so tann stóri undirsjóvartunnilin millum Klaksvíkina og Leirvík og sostatt var nú beinleiðis vegasamband millum Kunoy, Borðoy, Viðoy, Eysturoy, Streymoy og Vágarnar.

Brúgvin við Streymin var fyrsta stig í miklu verkætlanini at sambinda føroyska veganetið. Brúgvin verður eftirkannað fimta hvørt ár fyri slit - og í 2011 vórðu umfatandi ábøtur framdar og brúgvin víðkað við gongubreyt/súkklubreyt.

Brúgvin við Streymin og vegir og tunnlar, ið eru knýttar at henni, hava havt alstóran týdning fyri føroysku samferðsluna og samfelagsmenning sum heild.

**Brúgvin um Sandá**

Meðan brúgvin við Streymin bindur oyggjarnar saman, ger brúgvin um Sandá annað gagn. Sandá rennur úr Havnardali oman í Sandágerði og hevur frá gamlari tíð verið markið millum Havnina og Argir. Argir var fyrr serstøk bygd, men ógvusliga útbyggingin av bústaðarøkjunum í høvuðstaðnum hava ført við sær, at Argir í dag er ein tann størsti býarparturin í Havn.

Men soleiðis hevur ikki altíð verið. Argir – navnið stavar frá føroyska heitinum "ærgi", t.v.s. summarbeiti, summarhagi – lá leingi óbygd. Einaferð í sekstandu øld varð Argja hospital, eitt búpláss fyri fólk við spitalskusjúku, bygt á staðnum - men eftir at ein koppafarsótt í 1709 tók lívið av 12 av teimum 15 sjúklingunum, var ikki stórvegis tørvur á hospitalinum longur. Í 1826 varð avgjørt at byggja eitt sjúkrahús í Havn og í 1828 varð Argja hospital og jørðin, ið hoyrdi til, seld á uppboðssølu. Tað var Andrass Mortensen, timburmaður, jarnsmiður og gróthøggari, ið keypti jørðina – og í 1829 búsetti hann seg við familju á Argjum.

**Fyrstu brýrnar**

Andrass Mortensen var umtóktur handverkari og ferðaðist víða um í Føroyum í arbeiðsørindum. Men hann hevði eina forðing á leiðini – tað var ofta ringt at taka seg yvir løgasteinarnar í Sandá, serliga eftir regn. Tað gjørdist ov tvørligt hjá Andrassi at rógva til Havnar og hann setti sær tí fyri, at byggja eina brúgv um Sandá. Myndugleikarnir vildu ikki stuðla verkætlanini fíggjarliga, so Andrass fór tí av sínum eintingum undir arbeiðið í 1831. Í byrjanini hjálpti Gad prestur, sum tá búði í Sandágerði til, men tá hesin fór av landinum aftur, var tað upp til Andrass sjálvan at baksa teir stóru steinarnar til undirlagið undir træbrúnna.

Brúgvin hjá Andrassi stóð liðug í 1835, til miklan lætta hjá argjafólki og fyri fólk úr Kirkjubø og Velbastað. Í nærum heila øld var brúgvin einasta samband millum Argir og Havnina – men tá bilarnir komu til Føroya, uppstóð tørvur fyri einari størri brúgv. Seinast í tjúgunum var ein steinbrúgv laðað eitt sindur niðanfyri gomlu brúnna - og í sekstiárunum varð ein betongbrúgv bygd nærhendis.

**Nýggja brúgvin**

Eftir stóru útbyggingarnar av bústaðarøkjum á Argjum, gjørdist trýstið á brúnna frá sekstiárunum ov stórt. Tórshavnar býráð avgjørdi tí at byggja eina tíðarhóskandi brúgv yvir Sandá – hesa ferð longur uppi í dalinum. Tað var ein treyt fyri byggingina, at brúgvin ikki skuldi ávirka náttúruvakra umhvørvið við ánna, so brúgvin skuldi liggja høgt yvir ánni og brúgvafestini langt frá áarbakkanum.

Í 2014 fór byggifelagið J&K Petersen undir at byggja brúnna og tann 28. mai 2016 varð hon alment tikin í nýtslu.

Brúgvin um Sandá er gjørd úr stáli og betong. Hon er 140 metrar long, 14,5 metrar høg og hevur tvær koyribreytir umframt gongu- og súkklubreyt. Brúgvin tekur nógv pláss í landslagnum og sæst væl - men snøgt byggisnið og litfagur ljósbúnaður bøta um heildarmyndina, serliga við teimum U-sneiddu súlunum, sum minna um upprættar armar ið halda brúgvarbreytini uppi.

Tað er ein heimur og nær um tvær øldir ímillum brúnna hjá Andrassi Mortensen og nýggju Sandábrúnna – men andin er hin sami: samvirki, virkisfýsni og menning.

*Anker Eli Petersen*










FO 887-888

Royndarprent

# Fuglafjørður 1918 - 2018

**Kommuna í 100 ár, skapandi staður í 1000 ár**

Fuglafjørður liggur djúpt inni í einum væl vardum firði. Kringsettur av sjey høgum fjøllum liggur hesin lívligi, lítli býur við litføgrum húsum eftir fjallasíðunum og krokar rundan um ein vakran foss og ein fjálgan sand. Hetta hevur verið vælumtókt búpláss heilt aftur í forna tíð, tí her vóru allar fortreytir fyri búseting og menning: Náttúruhavn beint við bestu fiskimið, áarvatn, grønur bøur og góður sólargangur, hóast høg fjøll.

**Toftarannsóknir**

Lítið er nevnt um Fuglafjørð í gomlum skrivligum keldum. Men at hetta hevur verið búpláss leingi, vísti ein fornfrøðiligur útgrevstur í 1958 á Oyruni við Gjógvará. Sverri Dahl, fornfrøðingur, stóð fyri útgrevstrinum. Grivið varð niður á fleiri eldri húsatoftir, átta tilsamans upp ígjøgnum tíðina, har fleiri spennandi brúkslutir og búnýtir eisini komu undan kavi. Mett varð, at niðastu húsatoftirnar og lutirnir haðani vóru frá víkingatíð, leystliga frá umleið ár 1000 e.Kr. Niðasta húsið vísti seg at vera eini langhús, sum líktust teimum, sum eisini eru funnin í Leirvík og Kvívík, tvs. millum 15 - 20 metrar langt, tó at broytingar í lendinum við áarmunnan her hava gjørt, at annar endin av húsunum er horvin út í ánna.

Ymiskir lutir vórðu funnir, t.d. ymisk træ- og steiníløt, heslinøtur, brýnir, leikur, talvfólk ella líknandi og ein vaðsteinur við einum íhøgdum mynstri, sum verður nevndur Johannesarkrossurin, og sum vit í dag kenna sum teknið fyri fornminni á skeltum og kortum. Harumframt vóru perlur úr glasi - grønar, bláar og gular - funnar.

**Bandflættumynstrið**

Serliga spennandi er tó ein ískorin fjøl, sum helst hevur verið lokið á einum kistli.

Kámt hómast eitt dupult bandflættumynstur ringja seg regluliga runt á fjølini. Mynstrið er høgt soleiðis í, at tað stingur seg uppúr yvirflatuni. Fjølin er illa farin, annar endin brotin, og bara partur av mynstrinum sæst. Tó er ikki er torført at síggja, hvussu mynstrið man hava hava sæð út í síni heild (sí frímerki). Mynstrið er eitt av mongum dømum um keltiskt snið, sum verður partur í keltiskt-norrønu blandingsmentanini, sum gerst eykenni fyri vestara partin av víkingaheiminum. Mynstrið er í dag kent undir heitinum *'The Celtic quaternary knot'* ella 'keltiski ferhyrnti knúturin'.

Higartil er hetta einasta slíka ískorna træsprek við mynstri á, sum vit kenna til í Føroyum frá teirri tíðini, men kortini eru tó nakrir líknandi lutir funnir við keltiskum mynstri ella við íblástri úr keltiskum sniði, t.d. tvær bronsunálir og eitt bronsuáslag.



Listaverkið "Portrið til verðina". Mynd: Brynhild Næs Petersen.

Ískorna fjølin er ikki fullkomin, hvørki sum mynstur ella handverksliga. Tó hava vit, við ískorna dupulta bandflættumynstrinum, fingið eitt elligamalt, vakurt og gátuført mynstur, sum vitnar um ein gerandisdag fyri eini 1000 árum síðani, har brúkslist eisini átti sín part. Sandlíkt er, at landnámsmenn hava havt kistilin ella lutin við sær til Føroya, tó ber eisini til at ímynda sær, at mynstrið kann vera telgt í fjølina niðri við langeldin í húsunum á Oyruni.

Ja, nógvir spurningar stinga seg upp. Hvat munnu tey, ið áttu kistilin, hava fingist við dagliga? Hvørji vóru tey? Munnu glasperlurnar hava ligið í kistlinum? Fluttu fólkini avstað aftur, ella hvat hendi við teimum? Man mynstrið hava havt ein súmbolskan ella átrúnaðarligan týdning, ella var tað bert ein partur av útbreidda keltiskt-norrøna mótarákinum tá í tíðini?
Mynstrið livir nú í øllum førum aftur millum manna. Tað hugtekur, fortelur um farnar tíðir og kveikir komandi.

**Portrið til verðina**
Hugurin at skapa livir enn her. Fuglafjørður er kendur sum ein býur við kreativum fólki og spennandi tiltøkum. Her eru dugnalig sangkór, vælspælandi hornorkestur, eitt dúgligt heimavirkishús og gallarí, Mentanarhúsið við nógvum fjølbroyttum tiltøkum, listafólk og ymisk ítróttarfeløg. Harumframt eru fleiri stevnur, so sum Varmakeldustevnan, Bindifestivalurin, Harmonikutreffið og Mentanardagar.

Í 2004 var serliga nógv gjørt burtur úr einari Varmakeldustevnu, sum fekk heitið Menniskjan í søgu og søgn. Hendan listastevnan hevði skapandi listafólk úr Føroyum og útlondum, sum vóru saman um at skapa bæði løtubarar og varandi listarligar upplivingar. Millum serskrivaðar kantatir, modernaðan dans í bátahylinum, listaframsýningar o.a., varð við bátahylin eisini sett upp eitt stórt listaverk, sum enn vekir gleði og ans í býarrúminum. Danski listabólkurin 7·9·13 við Anette og Michael Arleth og Em Hess gjørdu hetta verkið, sum kallast '*Portrið til verðina*' og hevur fimm stórar skulpturar, sum ímynda stór klettaportur gjørd úr jarni. Skulpturfamiljan er gjørd við íblástri úr myndaverðini hjá Williami Heinesen, og bæði í og á hesum portrum eru figurar, so sum marmenlar, fuglar og fiskar. Listaverkið spælir við kontrastirnar millum skroypilig pappírsklipp og varandi rustað jarntilfar, millum søgn og vinnu, list og grót, har tað liggur á eggini millum hav og bý, millum tað villa og tað tamda, eitt portur út í heim og inn í heim.

*Fuglafjarðar kommuna*

# Nýggjar útgávur - 23. apríl 2018




FO 881-882 Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Havnar Sjónleikarfelag 100 ár** |
| Útgávudagur: | 23.04.2018 |
| Virði: | 2 x 19,00 kr. |
| Nummar: | FO 881-882 |
| Stødd, frímerki: | 43,0 x 25,5 mm |
| Stødd, smáark: | 100 x 70 mm |
| Uppseting: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja stórbrøv, 51-100 gr. |




FO 883 Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **SEPAC 2018: Spectacular Views** |
| Útgávudagur: | 23.04.2018 |
| Virði: | 20,00 kr. |
| Nummar: | FO 883 |
| Stødd, frímerki: | 28 x 42 mm |
| Myndatøka: | Ólavur Frederiksen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til onnur lond, 0-50 gr. |




FO 884 Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Norðurlandaútgáva 2018: Makrelur** |
| Útgávudagur: | 23.04.2018 |
| Virði: | 18,00 kr |
| Nummar: | FO 884 |
| Stødd, frímerki: | 25,5 x 44,0 mm |
| Listafólk: | Astrid Andreasen |
| Prentháttur: | Offset + silver metallic og gloss varnish |
| Prentsmiðja: | The Lowe Martin Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til Europa, 0-50 gr. |






Sjálvklistrandi hefti




FO 885-886 Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **EUROPA 2018: Brýr** |
| Útgávudagur: | 23.04.2018 |
| Virði: | 10,00 og 18,00 kr. |
| Nummar: | FO 885-886 |
| Stødd, frímerki: | 30 x 40 mm |
| Myndatøka: | Ólavur Frederiksen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv, og smábrøv til Europa, 0-50 g. |







FO 887-888 Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Fuglafjarðar Kommuna 100 ár** |
| Útgávudagur: | 23.04.2018 |
| Virði: | 14,00 og 22,00 kr. |
| Nummar: | FO 887-888 |
| Stødd, frímerki: | 30 x 40 mm |
| Listafólk: | Suffía Nón |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja stórbrøv, og stórbrøv til Europa, 0-50 g. |

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Áin fletir upp um seg. Myndatøka: Jógvan Hansen. Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark.

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

/faroestamps